SKAPANDI UMHVØRVI
TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN



Tekniski Skúlin í Tórshavn
Smiðjugerði 1
Postrúm 3239
110 Tórshavn

0
60
st@skulin.fo
Heimasíða: www.tst.fo

TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN

# Rumeniaverkætlan 2011




Næmingar, ið vóru við á námsferðini í mars 2010:

*"Eg fái ilt í hjartað, av at síggja hetta, trúði ikki nakar kundi liva soleiðis"* - Hans Óli Højgaard, næmingur á TST

*"Eg veit ikki, hvat eg skal siga, tað veit Gud, eg eri málleysur"* - Torvald Abrahamsen, næmingur á TST

Endamál:

at geva næmingunum á Tekniska Skúlanum eina námsferð, sum er fakliga viðkomandi, innlit í aðra mentan og at fremja hjálpararbeiði í Rumenia.

## STUTT UM VERKÆTLANINA

Vit fara úr Føroyum seinast í mars mánaði. Talan er um námsferð, har næmingar sleppa at royna seg í verki, og sostatt fáa royndir frá veruliga lívinum. Somuleiðis at geva okkara næmingum eina øðrvísi uppliving - eina námsferð, sum inniheldur tað at nýta sína vitan, fáa kunnleika til aðra mentan, síggja fátækradømi í Rumenia og samstundis hjálpa teimum lokalu til sjálvhjálp.

## HVAT GERA VIT

Hesaferð gongur leiðin til lítla bygd, Jebel, sum er í útnyrðingspartinum í Rumenia. Við á ferðini verða klædnaatstøðingar og maskinlærlingar.

Vit ætla at menna hetta lítla samfelagið, við at maskinlærlingar bøta um viðurskiftini hjá íbúgvunum og á skúlanum.

Klædnaatstøðingarnir hava klæðir og seymimaskinur við. Ætlanin er at læra tey at nýta seymimaskinurnar, seyma klæðini um, soleiðis at tey passa og annars læra tey at seyma burturúr meturvøru. Seymimaskinurnar verða latnar íbúgvunum.



## Hjálp til sjálvhjálp

## KRINGVARPIÐ

Ein flokkur frá Tekniska Skúla var á námsferð í mars 2010, har teir vitjaðu eina lítla bygd í suður-eystur Rumenia, ið kallaðist Clinsju. Her bøttu næmingar um hús, løgdu vatn og el inn. Á hesum túri var myndamaður frá Kringvarpi Føroya við, og sendingin, ið kom burturúr varð víst í KVF í heyst.

Brot úr hesi sending sæst á www.youtube.com/user/TSTromenia





## STUÐLIÐ VERKÆTLANINI

Hendan verkætlan kann ikki lata seg gera uttan stuðul.

Kostnaðurin fyri túrin er áleið 250.00 kr. Tá er tilfar íroknað.

Næmingar og arbeiðsgevarar gjalda ein part av ferðini og fyri tilfarið, ið skal nýtast til arbeiðið - men nøktar hetta ikki útreiðslurnar fyri túrin.

Tí vilja vit heita á tykkum at stuðla verkætlanini við at gjalda á konto:

EIK: 9181-995.843.8  
Føroya Banka: 6460-182.997.3

Vit takka fyri stuðulin